

*Løtan var kensluborin í Kvívík*



*Jacobina Jacobsen misti mannin við Stellu Argus*

eiga, og hon eigur son tann 29. oktober. Tað vil siga, at hetta er sama dag, sum Stella Argus varð saknaður. Tískil hevði Kim Anfinn 50 ára føðingardag nú týsdagin.

Boðini um lagnuna hjá manninum fekk Anna frá yvirlæknanum Paula Dahl. Bjarni, beiggi Joakim, greiður frá hvussu hann minnist dóttir Joakim, Jensina, sum tá var 13 ára gomul og eitt systkinabarn hennara, sita støðugt upp t radionum at frætta nýtt.

Sjálvur skuldi Bjarni giftast júst um hesa tíðina, men brúdleypið varð útsett nakrar mánaðir. Anna er deyð fyri fleiri árum síðani.

## Hevði kókað manninum seyðarhøvd til døgurða

Tað eru ikki nógvar eftir av einkjunum, men vit hava prátað við ta 81 ára gomlu Jacobinu Jacobsen. Hon var gift við Oskar Jacobsen, sum var kyndari við Stella Argus. Sjálv er Jacobina úr Hósvík, men tey giftust til Válir, haðani Oskar var ættaður. Men tey vóru byrjað at byggja í Hósvík og skuldu flyta hagar.

Hendan dagin, Oskar var væntaður heim, hevði Jacobina kókað seyðarhøvd, so maðurin skuldi fáa ein góðan døgurða, nú hann kom heim. Tí kom tað sum ein bumba, tá tíðindini hoyrdust í útvarpinum um, at leitað varð eftir skipinum.

Oskar hevði annars siglt undir øllum krígnum og var sloppin væl burtur úr tí, og nú skuldi hann fara í størsta forlissinum aftaná bardagan.

Jacobina hevði eisini droymt um hesa tíðina. Hon droymdi, at hon stóð í vindeyganum og sá Oskar koma niðan móti húsunum hjá teimum. Hann kemur niðan ímóti kirkjuni, men tá ið hann fer framvið kirkjuna, hvørvur hann. Hetta kundi væl skiljast sum eitt "varsil".

Jacobina var við barn, tá ið Oskar fórst, og tann 12. mars átti hon eina dóttir. Men samstundis átti hon eina trý ára gamla dóttir, Lisbeth, sum var so illa sjúk í høvdinum. Hon doyði eitt ár aftan á pápan. Tey vóru fýra børn, so nú gjørdust bert trý eftir.

Beiggjarnir hjá Jacobina hjálptu henni at gera húsini liðug, og tá flutti hon til Hósvíkar. Har var nú ikki so lætt at lívbjarga sær, so 10 ár seinni flytir hon til Havnar, har hon fekk arbeiði sum vaskikona á røktardeildini á landssjúkrahúsinum. Her var hon tilsamans í 27-28 ár. Børnini hjá henni eru annars Kristian Martin, Sunneva og Osvør, sum býr í Íslandi.

Jacobina sigur, at tað sum hevur hjálpt henni gjøgnum lívið er eitt lætt sinnalag.

## Rætting

At enda skal vera gjørd ein rætting til Miðvikuna í seinastu viku, har tað varð sagt, at Kitti Davidsen av Sandi hevði mist ein beiggja í eini flogvanlukku árið frammanundan. Hesin upplýsingur var úr grein í donskum blaði frá hesi tíðini. Hetta var skeivt. Beiggin Benadikt var jagarapilotur. Tað er rætt, at hann var úti fyri eini flogvanlukku, men tað eydnaðist honum at skjóta seg út í katapulti og lenda í fallskýggi, og bjargaði hann harvið lívinum.

Annars er Sosialurin fegin um at hava kunnað givið eitt íkast til søguna um Stella Argus. Tað verða sjálvsagt færri og færri sum minnast slíkt, sum liggur so langt afturi í tíðini. Tí er tað umráðandi, at minnið verður varðveitt við at kunna festa tað á blað, sum kann staðfestast. Tí fara vit eisini at takka øllum teimum, sum vit hava havt samband við, og sum hava gjørt hetta møguligt.



*Nógv fólk var samankomið í Kvívík í sambandi við minningarhaldið*